# VINNUSÍÐUR

SAMBAND
Jan Müller
jan@sosialurin.fo
tlf 341800

# Toftamenn byggja longstu



Føroyingarnir, sum arbeiða í námsprojektinum í Fiskifjørðinum. Teir arbeiða fyri MT Højgaard, Sea Star á Toftum, FJM í Runavík, Sofus M.



Fólk hjá Sea Star forskalla

**Fleiri føroyskar fyritøkur eru við í arbeiðinum at gera eina námsbygd við stórari havn í Fiskifjørðinum í Vesturgrønlandi, teirra millum Sea Star á Toftum, sum í løtuni er við at leggja seinastu hond á longstu havnina í Grønlandi. Eisini FJM í Runavík er við og setir upp eitt risastórt knúsiverk. Alt gongur sum ætlað.**

FØROYINGAR Í GRØNLANDI
*Jan Müller*
jan@sosialurin.fo

Tað eru boð eftir føroyingum í útlandinum. Eitt nú í Grønlandi. Fyritøkan Sea Star á Toftum er í løtuni við at byggja longstu havn í Grønlandi. Hon er 300 metrar og er í Fiskifjørðinum í Vesturgrønlandi, har ein ein stór námsútbygging er í gongd.

Talan er um eitt olivinnám, sum hol varð sett á fyri góðum ári síðani. Nú verður so seinasta hond løgd á projektið við eitt nú føroyskari arbeiðsmegi. Sea Star er partur av verkætlanini og hevur staðið fyri uppsetan av arbeiðsskúrum, vegagerð og havnagerð. Tilsamans 21 mans eru knýttir at arbeiðsuppgávunum í Grønlandi. Í løtuni eru 14 mans til arbeiðis í Fiskifjørðinum. Oddamaður er Jákup Martin Kjeld, sum setti Sea Star fyritøkuna á stovn saman við beiggja sínum fyri trimum árum síðani.

Hetta samstarv byrjaði í sambandi við bygging av nýggja Føroya Telebygninginum. Tá vóru teir frá Sea Star við sum undirveitarar hjá donsku byggifyritøkuni MT Højgaard. Somikið væl eydnaðist henda byggiuppgávan og samstarvið við MT Højgaard, at felagið á Toftum varð tikið við í stóru námsverkætlanina í Eysturgrønlandi, sum MT Højgaard stendur fyri.

## Aðrar havnaútbyggingar

Eftir at hava verið við til at gera námsbýin kláran hava fólkini hjá Sea Star arbeitt við at gera havnina lidna. Hon skal taka skip, sum lasta 55.000 tons av olivin. Fólkini hjá Sea Star eru kavarar og handverkarar av ymsum slag. Partur av arbeiðinum er eisini at gera betongfundament til eitt risastórt knúsiverk. Ætlanin er, at havnin skal vera liðug í september. Tá hetta arbeiðið er liðugt liggur føroyska fyritøkan eisini framvið at vera við í havnaútbyggingum í Nuuk og øðrum grønlendskum býi.

Jákup Martin Kjeld, sum er høvuðsmaðurin aftanfyri Sea Star hevur sjálvur arbeitt hjá MT-Højgaard og hevur har fingið royndir við eitt nú havnabygging. Í løtuni starvast 33 fólk hjá fyritøkuni. Tey, sum ikki eru í Grønlandi, arbeiða sum undirveitarar hjá MT Højgaard, sum stendur fyri um- og útbygging av SMS.

Jákup Martin er nøgdur við arbeiðið teir hava gjørt í Grønlandi. Tað er hart arbeiði men fólkið trívist væl sigur hann.